# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Mikkjal gevst við fótbóltinum

**Ein av stóru profilunum í føroyskum fótbólti seinnu árini tók í gjár avgerð um, at hann ikki fer at spæla fótbólt á hægsta støði í 2009**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Mikkjal Thomassen hevur seinnu árini verið ein av mest markantu profilunum í føroyskum fótbólti. Og ikki minst hevur hann eisini verið ein tann mest vinnandi hesi árini.

Seinastu fýra árini hevur talan soleiðis verið um tvey FM-heiti og tvey Løgmanssteyp við ávikavist B36 og EB/Streymi, umframt at hann eisini hevur verið við til at spælt lið sítt víðari í bæði Champions League og UEFA-Cup undankappingini.

Og oman á tað heila slapp hann eisini nakað seinkað upp í føroyska landsliðshópin. Har hevði hann annars ikki verið, síðani ein mest sum ótýðandi træta við táverandi landsliðsvenjaran – Allan Simonsen – í 1997 bar við sær, at hann varð settur uttan fyri landsliðshitan. Á heysti í 2006 sendi Jógvan Martin Olsen tó boð eftir Mikkjali, tá Føroyar spældu heimadyst móti Litava, og síðani ta løtuna hevur hann verið eitt tað tryggasta kortið á talvuni, tá landsliðið er sett.

Og sum heild er gjøgnumbrot hansara komið rættiliga seint. Blaðungur var hann annars partur av besta HB-liðnum, men í 1999 valdi hann at royna seg hjá B36, eftir at hann annars hevði umhugsað at sett gaggurnar heilt á hillina. Útbúgvingarørindi í Danmark bóru við sær, at hann als ikki var á føroysku vøllunum í eini trý ár, og tá hann vendi heim í 2004 hevði hann stórar trupulleikar av skaðum, meðan lið hansara, B68, hevði eins stórar trupulleikar á vøllinum og flutti niður. Men síðani hann í 2005 var við til at vinna FM við B36, hevur eingin innan føroyska fótbóltsheimin ivast í, at her var talan um ein tann mest týðandi spælaran í landinum.

Seinastu tvey árini hevur ein eym hælsina tó argað rættiliga nógv, og í fjør gjørdist talan langt ífrá um so nógvar minuttir á vøllinum, sum Mikkjal sjálvur kundi hugsað sær. Og hetta ger nú, at hann setir gaggurnar.

- Eg hevði væl tímað at spælt meira. Men eg vil ikki halda fram undir teimum fortreytum, sum eg stríddist ímóti í fjør, og so er tað kanska best bara at gevast heilt, sigur Mikkjal Thomassen, sum í gjár gav venjarum sínum í EB/Streymi og Jens Martin Knudsen, ið má metast sum virkandi landsliðsvenjari, boð um, at hann ikki longur er virkin á hægsta stigi innan føroyskan fótbólt.




*Beinini eru um at vera slitin heilt upp, og tí hevur Mikkjal Thomassen gjørt av at steðga við fótbóltinum, heldur enn at treiska seg igjøgnum enn eitt ár við nógvum skaðum*



*Verður Kaka seldur úr Milan til Manchester City, verður tað eftir øllum at døma í einum handli, sum spreingir øll mørk*

## Metupphæddir freista Kaka og Milan

**Hóast Manchester City er til reiðar at rinda Milan yvir 800 milliónir og meira enn fýra milliónir í vikuløn til Kaka, ætlar spælarin sær ongan veg**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Manchester City er til reiðar at spreingja øll mørk innan spælarahandlar. Stóri trupulleikin er, at tað ber illa til at fáa røttu spælararnar til hópin.

Enskir miðlar skriva, at umboð fyri Manchester City eru í Milano, har tey hava boðið AC Milan ikki minni enn £100.000.000, um teir vilja selja Kaka, sum í 2007 varð kosin heimsins besti fótbóltsspælari. Somuleiðis sigst felagið vera til reiðar við einum sáttmála, sum gevur brasilsa bóltsnillinginum eina vikuløn upp á £500.000.

Men tað tykist tó nytta lítið. Higar til hevur Milan ikki tikið av, men sum skilst, hevur felagið tørv á peningi, um teir framhaldandi skulu dystast við tey bestu í Europa. Og umboðsmaðurin hjá Kaka sigur, at tað ikki er óhugsandi, at teir fáa loyvi at tosa við enska felagið.

Kaka sjálvur sigur tó, at hann helst av øllum vil verða verandi í Milano.

- Tað eru ikki pengarnir, sum eru altavgerandi. Eg stórtrívist í felagnum, og eg kundi hugsað mær at blivið gamal í felagnum. Ynskja teir hinvegin at selja meg, noyðist eg sjálvandi at taka støðu til tað, sigur Kaka.

# Norðmenn hava leitað Drillo fram aftur

**Norska fótbóltssambandið vónar at fáa líka góð úrslit, sum í 1990-unum**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Norska fótbóltssambandið, NFF fór í endurnýtsluna, og hevur nú valt at seta Egil "Drillo" Olsen í starv, sum høvuðsvenjara hjá norska fótbóltslandsliðnum. Drillo hevur tikið við einum tilboði, og nú kl. 14 verður tíðindafundur á Ullevaal í Oslo.

Árini 1990-1998 var Drillo norskur landsliðsvenjari, og eydnaðist tað liðnum at spæla seg til HM-endaspølini í 1994 og í 1998.

Í 1994 vísti Noreg sera defensivan fótbólt, og gav tað Drillo nógva antipati í fótbóltsheiminum. Í 1998 var spælið eitt vet meiri undirhaldandi, og eydnaðist tað tá Noregi at vinna seg í 1/8 finaluna. Tað mest minniliga var tá Noreg vann 2-1 á Brasilia.

Kjetil Rekdal, sum skeyt sigursmálið fyri Noreg tá, er annars dansandi óður inn á norska fótbóltssambandið, at hesi hava drigið tann skjótt 67 ára gamla venjaran fram aftur. Kjetil Rekdal metir starvssetanina hjá NFF at verða eitt afturstig fyri norskan fótbólt.



*Norska fótbóltssambandið leitar aftur á slóðina við at seta Drillo sum landsliðsvenjara*